Sørvágs kommuna

# Kunningarskriv

# 2013



www.sorvag.fo

**Sørvágs Kommuna**
FO-380 Sørvágur • Tlf. +298 363200 & 363205 • Fax +298 363201
E-mail: sorvag@sorvag.fo

# Kunningarskriv 2013

## Góðu borgarar í Sørvágs kommunu

Við árslok í fjør tók nýtt bygdaráð við. Um nýggja bygdaráðið fór at taka undir við teimum raðfestingum, sum undanfarna bygdaráð hevði gjørt, vistu vit ikki, tá síðsta kunningarskrivið varð skrivað, men tað vita vit nú.

Nývalda bygdaráðið tók í høvuðsheitum undir við teirri fíggjarætlan, sum samtykt varð við ávísum broytingum, sum vit koma aftur til í hesum tíðindaskrivi.

## Fíggjarætlanin fyri 2013

Tað hevur verið siðvenja tey síðstu nógvu árini at taka afturíaftur fíggjarætlanina fyri brátt farna ári, fyri at halda í oyrunum á okkum sjálvum. Hvat varð broytt í árinum, sum fór, og hví, eru viðkomandi spurningar hjá borgarunum at fáa svaraðar?

Og vert er eisini at nevna, at tað bert eru íløgur, vit tosa um, tí raksturin plagar at vera á leið tað, sum samtykt er. Vit hava eisini verið so vælsignaði og heppin tey nógvu síðstu árini, at inntøkuhækkingar væl og virðiliga hava verið nóg stórar til smærri eykajáttanir í rakstrinum, sum plaga at verða samtyktar síðst í árinum.

## Ætlanin fyri íløgur í 2013

| | |
|---|---|
| Kommunufyrisitingin | 100.000 |
| Alvalon | 100.000 |
| Skúlin | 10.900.000 |
| Ítróttaranlegg | 700.000 |
| Fríðkan | 664.000 |
| Byggibúning | 100.000 |
| Vatnveiting | 108.000 |
| Kloakkir | 542.000 |
| Nýggir vegir | 1.074.000 |
| Gøtuljós | 217.000 |
| Havnir og lendingar | 325.000 |
| **Íalt** | **14.830.000** |

## Kommunufyrisiting og Alvalon

Kommunufyrisitingin fer at brúka sína játtan til telduútgerð, meðan umbyggingin av loftinum á Alvalon fór við størsta partinum av játtanini, har ætlaðu broytingarnar, fyri at fáa stovnin at virka enn betur nú eru loknar.

**Sørvágs Kommuna**
FO-380 Sørvágur • Tlf. +298 363200 & 363205 • Fax +298 363201
E-mail: sorvag@sorvag.fo

## Skúlin

Tey síðstu trý árini er skúlin farin við bróðurpartinum av íløgukarminum. Upphæddirnar til daggføringina hava verið hesar:

| | |
|---|---|
| 2011 | 6.193.000 kr. |
| 2012 | 7.665.000 kr. |
| 2013 | 12.446.000 kr. |
| **Íalt** | **26.304.000 kr.** |

Dagføringin av skúlanum snýr seg um eina rúgvu av fermetrum. Skúlabygningurin er, sum vit vita, samansettur av einari røð av byggistigum, og hava vit, fyri at halda skil á hesum í samband við orkualbøtingina givið hvørjum bygningsparti navn. Tekningin niðari vísir heitini, sum vit hava brúkt.




Yvirlit yvir víddina av teimum ymisku bygningspørtunum

| | | | Fermetrar |
|---|---|---|---|
| **UPPRUNALONIN og EYSTURLONIN** | | | |
| 2. hædd | | | 640,4 |
| 1. hædd | Skúlastovur | 234,3 | |
| | Tannlæknahølir | 163,1 | |
| | Gongs/trappurúm | 44,8 | |
| | Servara- og Tøknirúm | 54,1 | |
| | Køksøki/gong | 105,7 | 602,0 |
| | | | **1242,4** |

| | |
|---|---|
| **Samanbygging** | |
| Gongspallur | 113,4 |
| Miðlahøll | 173,9 |
| Forhøll | 301,5 |
| Høvuðsinngong | 28,6 |
| | **617,4** |

## Svimjihøllin

| | |
|---|---|
| Svimjihøllin og umklæðing 2. hædd | 388,1 |
| Umklæðing 1.hædd (fýrrúm v.m. ikki talt við) | 135,2 |
| | ------------ |
| | **523,3** |

Sostatt hava vit umvælt og gjørt av nýggjum ( **1.242,4 + 617,4+ 523,3) = 2.383,1 fermetrar fyri kr. 26.304.000**. Hetta gevur í miðal 11000 fyri hvønn fermetur. Hevði talan verið um nýbygging, so hevði fermetraprísurin verið tað tvífalda. Um vit valdu røttu loysnina, kunnu fólk sjálvi meta um, tá hesin parturin av skúlanum verður vístur fram fyri almenninginum, tá arbeiðið verður liðugt einferð í komandi ári.

## Tannlæknamálið

Nevndi í byrjanini, at sitandi bygdaráð í høvuðsheitum tók undir við fíggjarætlanini, sum undanfarna bygdaráð hevði samtykt, men har var eitt undantak, nevniliga tannlæknastovan. Áðrenn vit fara víðari, skal verða tikið eitt sindur afturíaftur okkara tannlæknasøgu. Longu í 1954 skrivar Sørvágs- og Bíggjar sjúkrakassi til sóknarstýrið um at fáa høli til vega, soleiðis, at tannlæknar kunnu koma higar at praktisera tvær ferðir um árið. Eisini varð heitt á sóknarstýrið at virka fyri, at fáa eina skipan í lag við læknan í Miðvági, soleiðis, at hann einaferð um vikuna hevði viðtalu í Sørvági. Tað hevði spart fólki nógv í útreiðslum, bæði í ferðapengum og øðrum, verður sagt í skrivinum.

## Kaj Lydersen Kaysfeld

Tað gingu fimm ár frá tí, at sjúkrakassarnir skrivaðu til sóknarstýrið, til søkt varð eftir tannlækna. Ár 1959 tann 28. september var fundur á kommunuskrivstovuni. Møttir vóru D. Niclasen, P.H.Weihe, Jóhan á Stongum og Hugo Fjørðoy. Á hesum fundi varð samtykt at seta Kaj Lydersen Kaysfeld sum "kliniksjef" við skúlan, treytað av, at hann játtaði at samstarva við læknan.
Kaysfeld hevði vánaliga heilsu, og í 1963 varð Victor Glavind, tannlækni, settur í starv. Seinni, í 1965, varð Knud Magnus From settur í starv, og sostatt vóru tveir tannlæknar í bygdini.
11. desember 1969 varð Karl Jóhan Nielsen settur í starv av Felagskommununum í Vágum, og hevur hann røkt starvið uttan tað eina árið, tá hann var í farloyvi. Eftir avtalu við kommununa varð Karl Jóhan Nielsen loystur úr starva frá í apríl í ár.
Í samband við dagføringina av skúlanum, høvdu bygdaráðslimir sligið seg til tols við, at Karl Jóhan fór at verða tann, sum sløkti ljósið, tá hann fór úr starvi, men so var ikki til alla lukku.

## Mortan í Hamrabyrgi

Tíðliga í vár setti Mortan í Hamrabyrgi, tannlækni, seg í samband við undirritaða. Úrslitið av samrøðunum okkara millum var, at bygdaráðið einmælt samtykti at gera eina nýmótans tannlæknastovu, og gera samstarvsavtalu við Mortan um viðgerð av skúlabørnum og vaksnum.

Vit í kommununi hava verið stolt av at hava havt eina av fyrstu tannlæknastovum í landinum, og bygdaráðið fegnast um, at okkara børn, okkara borgarar og fólk yvirhøvur hava møguleika at verða viðgjørd her í okkara kommunu í einari nýmótans tannlæknastovu av góðum fólki. Vit ynskja Henny, Dagmar og Mortani blíðan byr.

At um- og útbyggja tannlæknastovuna hevði eisin sín prís. Veggir og rúm vórðu tikin niður, meðan aðrir nýggir veggir vórðu bygdir upp. Gólvið var drenað, bjálvað og hiti lagdur í á sama hátt, sum øll rúmini í uppruna- og eysturlonini.. Hetta gjørdi, at neyðugt varð at hækka játtanina við góðum 3. mió. kr., men nú skuldu vit havt eina nýmótans tannlæknastovu við øllum hentleikum fleiri ár fram.



## 07 Vestur

Í kunningarskrivinum í fjør varð sagt, at SÍ og 07 Vestur vóru í samráðingum um húsið á Dungasandi. 07 Vestur hevur yvirtikið rakstur og venjing av fótbóltinum, og tí var hildið, at tað var meinigsleyst at hava tvey hús á sama staði til sama endamál.
Úrslitið av samráðingunum millum feløgini var, at 07 Vestur keypir SÍ húsið og um- og útbyggir tað, til tann tørv og tey krøv, sum verða sett til lið í bestu deildini í dag.
Bygdarráðið hevur játtað felagnum stuðul til húsið soleiðis:

| | |
|---|---|
| 2013 | 700.000 kr. |
| 2014 | 600.000 kr. |
| 2015 | 600.000 kr. |
| 2016 | 500.000 kr. |

Umframt tað hevur Fótbóltsambandið játtað felagnum 600.000 kr. Fyri hesa upphæddirnar metir felagið, at fáa innilokað húsið og gjørt niðaru hæddina lidna.

Á ítróttarliga økinum verða tveir gamlir kenningar venjarar. Hegga skal venja 1. liðið við Jens Eriki sum hjálparvenjara, meðan Jens Erik skal taka sær av unglingaliðinum.



## SÍ

Tað, sum liggur í kortinum viðvíkjandi SÍ, er at felagið burturav fer at taka sær av flogbóltinum. Vit hava havt lið í bestu deildini, sum í nógv ár hava sett hesa ítrótt á Føroyakortið. Men nú fara onnur atlit í lívinum at gera um seg, serliga hjá kvinnunum.Tað er lívsins gongd.

Men vit vóna at maður kemur í manns stað og kvinna í kvinnu stað. Sørvágs Ítróttarfelag gjørdi hol í sjógvin í Mjølnirkappingini fyri yngru liðini nú um dagarnar, tá tey fingu hesi heiðursmerki:

Bronsa til gentur og dreingir 12
Gull til gentur og dreingir 14
Gull til dreingir 16, og bronsa til gentur 16
Gull til mansunglingarnar

**Fríðkan**

Aftur í ár hava vit roynt at fríðka um við grótlaðingum runt um í bygdunum.Í Gásadali er kirkjugarðurin liðugt laðaður, og í Bø hevur kirkjugarðurin eisin fingið eina bøtandi hond.

Traðarbrekka, sum er landsvegur, hevur eisini fingið eina rímiliga játtan tey síðstu árini, og avtala varð gjørd millum Sørvágs kommunu og Landsverk, at har sum betonggarðar vórðu tiknir niður í Traðarbrekku, skuldi kommunan gjalda munin millum ein grótgarð og ein betonggarð. Útreiðslurnar av gongubreyt og kloakk ber Landsverk.

Niðri við brúnna um Kirkjuánna er grótgarður laðaður, og gongst sum ætlað, verða allar kloakkirnar, sum renna í ánna oman fyri brúnna beindar í kloakkleiðing, har avlopið verður ført í verandi kloakkskipan út á Miðleitið. Tað hevði verið hugaligt at fingið ánna, sum liggur í júst hesum økinum at verið reina aftur. Og ætlanin er at náa hesum máli í komandi ári.

Um stóránna í Bø niðan fyri Laðafoss hava leiðingar ligið óskipaðir og bundnir upp í rekkverkið um brúnna. Avtala er gjørd millum eigararnar av leiðingunum, nevniliga SEV, Føroya Tele og Sørvágs kommunu um at deila útreiðslurnar av einari gongubrúgv. Leiðingarnir verða so lagdar undir brúnni.







**Kloakkir / Reinsiverk**

Tá talan er um útreiðslur hjá kommununum í framtíðini, hoyra vit ofta, at kravið um sóttreinsað vatn og spillivatnsætlanin fara at krevja nógv av fíggjarorkuni í framtíðini.Tá talan er um reinsiverk, so er okkara kommuna væl fyri. Vit hava reinsiverk í Sørvági, Bø og Mykinesi, og vatnið, sum seyrar undan høgu fjøllunum í Gásadali, er so reint frá skaparans hond, at myndugleikarnir halda ikki, tað er neyðugt við reinsiverki har.Vatngóðskan er í lagi.

Spillivatnsætlanin hjá kommununi hevur verið jólatrøll tvær ferðir. Í síðsta kunningarskrivi søgdu vit, at 30.12.2011 varð spillivatnsætlanin send til Umhvørvisstovuna til góðkenningar. Nú er loksins svar komið frá Umhvørvisstovuni, sum er dagfest.14.11.2013, har sagt verður, at øll ætlanin er góðkend. Sostatt eru ætlanirnar fyri, at allar fýra bygdirnar eru góðkendar. Síðani ætlanin varð innsend, eru broytingar gjørdar í skipanini hjá øllum bygdunum.

Ætlanin er at savna kloakkirnar saman ,soleiðis,at bert eitt útlát verður í Mykinesi, sum kemur at renna niður í Suðurgjógv. Í Bø verður eitt útlát,sum fer í sjógv sunnan fyri brúnna ,og í Gásadali verður eisini eitt, útlát, sum fer útav niðri við Múlafoss. Í Sørvági verða tvey, eitt uttan fyri bryggjuna og tað, sum longu er úti á Miðleiti.

Okkara ráðgevarar, PB consult hava gjørt eina kostnaðarmeting fyri spillivatnsætlanina, og hon sær soleiðis út:

| **Øki** | **Kostnaður u/MVG** |
|---|---|
| Mykines | 900.000 kr. |
| Gásadalur | 1.100.000 kr. |
| Bøur | 1.000.000 kr. |
| Sørvágur,øki 1 | 800.000 kr. |
| Sørvágur, øki 2 og 3 | 5.000.000 kr. |
| **Tilsaman** | **8.800.000 kr.** |

Tað er givið, at allar kloakkirnar verða ikki gjørdar eftir einum degi, men bygdaráðið fer ein av fyrstu døgunum í nýggja árinum at gera eina yvirskipaða ætlan, har sett verður út í kortið, hvussu vit fara at gera.
At enda í hesum brotinum um kloakkir v.m. kann verða tikið undir við sanginum, har sagt verður, "at mangt er undarligt, tað sigur abbi". Út í Stóránna í Sørvági renna tey flestu útlátini (rørini) í bygdini. Tey savnast øll undir brúnni um Stórá, nevniliga í Konshyli. Ongastaðni í nakrari á eru so nógv síl sum har. Hetta er nokk tað, sum kallað verður lagnunnar speisemi.Tey leggja nú ikki so nógv í dálkingina sum Heilsufrøðiliga Starvsstovan.

**Sørvágs Kommuna**
FO-380 Sørvágur • Tlf. +298 363200 & 363205 • Fax +298 363201
E-mail: sorvag@sorvag.fo

## Vegir v.m.

Tekniska nevnd plagar at gera eina raðfesting av, hvat gerast skal av íløgum í vegir v.m. Tey nógvu síðstu árini hava vit roynt at gjørt nýggju útstykkingarnar lidnar, tá bygt er á grundøkjunum. Hildið varð fram eftir hesum leisti í skjótt farna ári, samstundis sum ábøtur sjálvandi eru gjørdar á gamla vegakervið.

Høvuðsíløgan í ár var asfaltering av nýggjum vegum, samstundis sum stórt parkeringsøki er gjørt við Bonushyl í samband við, at talið av bilum er so stórt, serliga á morgni, tá tey flestu skulu fara til arbeiðis fyri klokkan átta.. Nú ber til hjá bæði starvsfólki, foreldrum og avvarðandi at parkera á hesum øki og ganga um nýggju brúnna um Stórá. Minnist bara til at **lata portrini aftur**, tí vit skulu helst ikki hava, at nakar av okkara ungu alvum skal fáa mein, ella tað ið verri er, av okkara gáloysni.

## Ferðsluforðingar

Av og á hevur verið tosað um ferðsluforðingar í bygdunum. Stundum er málið reist av borgarum, og eisini av bygdaráðslimum, uttan at nakað víðari er hent í málinum. Ferðslunevndini hjá Sørvágs kommunu hevur aftur í ár fingið áheitan um at bungur/vegforðingar verða gjørdar á Traðarvegi, Húsadalsvegi og í Hagagerði.
Av tí at økini í áheitanini eru so avmarkaði, har øll kenna hvønn annnan, og at tað uttan iva ber til at seta navn á tey, sum ikki duga sær hógv í ferðsluni, fara vit á henda hátt at heita á borgarar um at vísa skinsemi og koyra eftir ásetingum og umstøðum.

Hetta er ein innilig áheitan, men hjálpir tað ikki, so mugu onnur stig takast, sum kunnu vera tekniskar forðingar og sum so viðføra íbúgvum meirkostnað, sum slítur óneyðuga nógv upp á bilarnar.

## Samanumtikið

Skulu vit taka saman um árið 2013, hvat kommunuskattainntøkum viðvíkir, so hevur fyriblsskatturin fyrstu 11 mánaðirnar í 2013 verið 30.043.373 kr. Í mun til 28.735.587kr. fyrstu 11 mánaðirnar í 2012. Hetta er ein vøkstur upp á kr.1.307.786 ella 4.55%

**Fyri árið 2013 metti bygdaráðið inntøkurnar at fara at verða:**

| | |
|---|---|
| Kommunuskattur | 31.500.000 |
| Felagsskattur | 1.000.000 |
| Skattur av eftirløn | 800.000 |
| **Íalt** | **33.300.000** |

Sørvágs Kommuna
FO-380 Sørvágur • Tlf. +298 363200 & 363205 • Fax +298 363201
E-mail: sorvag@sorvag.fo

Felagsskatturin, sum er skattur frá feløgum, sum eru skrásett í kommununi , hevur verið nógv minni, enn árið frammanundan. Eisini onnur feløg sum tryggingar,peningastovnar og oljufeløg v.m., sum vit fáa skatt í mun til fólkatalið, hava givið nógv minni.
Rokna vit fyribilsskattin upp til 12 mánaðir, og tað plagar at vera á einari leið,so verður kommunuskattainntøkan kr. 32.774.590 fyri árið.

Tað vil siga, at fyribilstølini síggja soleiðis út:

| | |
|---|---|
| Kommunuskattur | 32.774.590 |
| Felagsskattur | 400.000 |
| Skattur av eftirløn | 740.000 |
| Inntøkur | 33.914.590 |

## Fíggjarætlanin 2014

Eins og landið skal hava eina fíggjarætlan fyri at hava rætt til at krevja landsskatt frá borgaranum, soleiðis skulu kommunurnar eisini hava eina fíggjarætlan fyri at fíggja rakstur og íløgur. Okkara ætlan varð samtykt endaliga við 3. viðgerð 27.11.2013.

## Høvuðstølini í fíggjarætlanini eru:

| | |
|---|---|
| Rakstrarútreiðslur | 28.647.000 |
| Avdráttir | 1.518.000 |
| Samlaður rakstur | 30.165.000 |
| Íløgur | 6.889.000 |
| | |
| Rakstur og íløgur | 37. 054.000 |
| Inntøkur | 34.226.000 |
| Av gjaldføri | 2.828.000 |

Skattaprosentið verður 21 fyri 2014 . Tað er sostatt óbroytt. Barnafrádrátturin verður eisin óbroyttur kr. 4000

## Fíggjarstøðan

Í kunningarskrivinum í fjør søgdu vit, at nettoskuldin við árslok 2012 fór at verða 15 mió. kr. Tá grannskoðaði roknskapurin fyrilá, vísti tað seg, at nettoskuldin var ikki 15 mió, sum mett, men 12.4 mió. Hetta, tí at inntøkurnar tey seinastu árini hava verið nógv hægri enn mett.

Vit hava tey seinastu nógvu árini gjørt stórar íløgur, sum lutvíst eru fíggjaðar við lántøku. Tann stóra íløgan hevur verið skúlin, og óneyðugt er at siga, at tað var í tøkum tíma, at hond varð tikin um hann.
Bygdaráðið var samt um, tá farið varð undir fíggjarætlanina fyri komandi ár, at skuldin við árslok 2014 skuldi ikki verða størri enn við árslok 2013. Hetta hevur eydnast, um okkara metingar fara at halda. Av lántøkuni til íløgur í 2013 skuldu 1.310 000 kr. verið óbrúktar, og sostatt farið í gjaldføri. Vit fara at gjalda 1.518.000 kr í avdráttum í 2014. Sostatt verður neyðugt at brúka 2.828.000 kr.av gjaldførinum, og nettoskuldin verður so tann sama við árslok næsta ár, sum hon er í ár.

**Sørvágs Kommuna**
FO-380 Sørvágur • Tlf. +298 363200 & 363205 • Fax +298 363201
E-mail: sorvag@sorvag.fo

**Íløguætlan fyri 2013**

| | |
|---|---|
| Kommunufyrisitingin | 150.000 |
| Børn og ung | 96.000 |
| Undirvísing | 3.490.000 |
| Mentan og frítíð | 600.000 |
| Teknisk mál | 2.283.000 |
| | |
| Kommunal virki | 270.000 |
| **Íløgur íalt** | **6.889.000** |

## Undirvísing

Hetta er fjórða árið á rað, at skúlin fær bróðurpartin av íløguætlanini, men so skuldu tær dagføringar, umbyggingar og nýbyggingar, sum vit settu út í kortið viðvíkjandi gomlu lonunum, verið loknar.

Í komandi ári verður partur av íløguupphæddini nýttur til innbúgv í gongspalli, køki, miðlahøll, forhøll og høvuðsinngongd. T.v.s. at nú skuldu næmingar, lærarar og onnur fingið gleði av teimum út- og umbyggingum, sum gjørdar eru síðstu árini.

Svimjihøllin fær eisini av íløguupphæddini í komandi ári. Ætlanin er, at orkualbøtingin skal gerast á sama hátt, sum gjørt er við hinar lonirnar. Veggirnir verða bjálvaðir, nýggj vindeygu verða sett í bygningin, og ein bygningur verður bygdur upp í síðuna oman móti kirkjugarðinum, soleiðis ,at heitir pottar einaferð í framtíðini kunnu verða settir í nýggja bygningin.

Úti í skúlagarðinum er ætlanin at gera eitt hátún undir skúlastovunum í Eysturlonini, soleiðis at fólk í koyristóli kunnu koma inn, eins og ætlanin er at fáa eina trappulyftu upp á gongspallin.

## Teknisk mál

Undir tekniskum málum eru fleiri rakstrarstøð. Vit halda fram við at fríðka í kommununi, ein sløk helvt verður sett av til nýggjar vegir, og ætlanin er av álvara at fara undir spillivatnsætlanina, sum áður nevnt, við eini hálvari mió.kr.

## Almennur peningur

Ynskiligt hevði verið í hesum døgum, har tosað verður um mia.kr. í vegakervið, at onkur bar ein tunnil frá Vatnsoyrum til Fútaklett upp á mál, men tað er so eiðasørt. Hesir 6 km. eru tað reina vatn í mun til tær upphæddir, ið nevndar verða í ramasta álvara av landsins hægsta røðarapalli, nevniliga í løgtinginum. Hesir tankar hava verið frammi fleiri ferðir fyrr, og verða sakliga viðgjørdir í Vága Samferðslusøgu. Hugsi tykkum til, hvussu ómakaleyst tað hevði verið fyri ferðafólkið til og frá flogvøllinum eins og fólkið úr Sørvágs kommunu at farið inn í

ein tunnil í Vatnsoyrum, fyri síðani at komið út aftur á slættlendinum við Fútaklett. Tað skal ikki tað stóra kynstrið til at rokna seg fram til, hvat loysir seg búskaparliga, og skuldi eitt sindur mangla í, so føli eg meg sannførdan um, at fólkið hevði verið sinnað at goldið eitt ávíst gjald fyri at stytt sær um farleiðina, nú Vágatunnilin er útgoldin í nærmastu framtíð.

Men tankar eru tollfríir, og reglurnar omanfyri eru fyri egna rokning Vit hava søkt Landsverk um nakað av peningi til infrakervið í Mykinesi. Vit hava verið leskaði við nøkrum upphæddum tey seinastu árini. Í ár er spælið skift út og í komandi ári hava vit søkt um oljutangar, og eina upphædd til asfalt og kloakkir. Í summar fór nýggi báturin Jósup í sigling, og ferðafólkatalið er vaksið munandi. Báturin teku 70 ferðafólk, og ein góðveðursdag kunnu 150 fólk standa sum sild í tunnu millum ferðagóðs o.a. Staðkendir menn halda, at tað ber til at gera eina nýggja atløgusíðu í hylinum millum núverandi atløgusíðuna og dráttin. Hetta hava vit heitt á Landsverk um at kanna.

Eisini hava vit heitt á Landsverk um at halda fram við at breiðka og gera gongubreyt í Taðarbrekku, sum er landsvegur, og er hetta í tráð við ta ferðslutrygdarætlan, sum varð gjørd fyri nøkrum árum síðani.

## Vinnulívið

Á vinnuliga økinum hava vit verið út fyri kollveltandi broytingum tey síðstu árini. Frá tí at veiða á føroyagrunninum eftir botnfiskasløgum var høvuðsálitið til í dag, har alivinnan og uppisjóvarfiskur er álitið, hevur havt stórar broytingar við sær. Gólvini á gomlu fiskavirkjunum liggja turr í summum støðum, meðan arbeiðið er til alla hendur í øðrum støðum, serliga har sum uppisjóvarfiskur og alifiskur verður virkaður.

## Hiddenfjord

Virksemið hjá Luna ella Hiddenfjord, sum tað nú verður kallað, er í vøkstri. Í 2010 vórðu 5000 tons tikin, í 2011 vórðu tonsini 7700, í 2012 vóru 7400 tons tikin.
Í ár hevur laksur verið tikin av Gøtuvík og úr Miðvági. Tað síðsta úr Miðvági verður slaktað fyri jól, og tá eru 10.000 tons tikin, sum er tað mesta nakrantíð.

Eftir ætlan byrja teir at taka laks av Sørvágs firði fyrst í februar í nýggja árinum. Tey vænta at taka somu nøgdirnar í 2014, sum í 2013.. Umfatandi út-og umbyggingar verða gjørdar á virkinum í hesum døgum, hetta, fyri at brynja virkið at taka ímóti størri nøgdum.

Sørvágs Kommuna
FO-380 Sørvágur • Tlf. +298 363200 & 363205 • Fax +298 363201
E-mail: sorvag@sorvag.fo



## Vága floghavn

Fyri teimum, sum starvast á Vága floghavn er tað eingin ivi, at longda flogbreytin og íløgan í nýggj innflúgvingartól hava gagnað føroyskari flogvinnu og ferðavinnu sera væl. Hetta segði Vága floghavn í tíðindaskrivi í fjør, og jaliga gongdin heldur fram.

Tað vísir seg, at ferðafólkatalið veksur enn. Í november var vøksturin 2,9%, meðan samlaði vøksturin í ár er 5%




2012 var metár, og tá komu og fóru 225.532 ferðafólk umvegis flogvøllin. Fram til 1. desember komu og fóru 220.874 ferðafólk. Tað mangla sostatt bara 4000 fólk í, at met verður sett aftur í ár. Vanliga ferðast umleið 15.000 fólk um vøllin í desember, so tað skal ganga illa í hond, um nýtt met ikki verður sett.

2014 sær lovandi út, tí ferðavinnuvirkir lata væl at søluni til komandi ár, og tað sær út til, at vinnan hevur fótað sær. Harumframt verður væntandi økt oljuleitingarvirksemi. Alt hetta merkir betri inntøkugrundarlag fyri flogvøllin og flogvinnuna sum heild.

Byggingin av nýggjari farstøð, tænastubygningi og anleggi gongur væl. Nýggja forplássið er tikið í brúk, tænastubygningurin er innilokaður, og meginpartrturin av avskildringini er liðug.

Farstøðin er reist, og Vága floghavn vónar og væntar, at hølini standa klár at taka í nýtslu í mai 2014. Vága floghavn sigur í stuttum tíðindaskrivi, at samstarvið við Sørvágs kommunu hevur verið fyrimyndarligt, og saman kunnu vit framyvir skapa og menna økið enn meira.

### Ídnaðarøkið á Hálsi

Á Hálsi nr. 1 húsast aftur í ár fleiri feløg. Har eru: JimS, EUR-Express, H.A.Bilar og Atlantic Airways. Har húsast sum er 40 fólk, so tað er eitt stórt arbeiðspláss eftir okkara mátistokki. Virksemið hjá JimS er vaksandi, og har eru 7 fólk í arbeiði. Fyrtøkan hevur úr at gera, og í ordrabókini eru kundar til alt 2014 og fram til summarið í 2015.
Eisini hjá EUR-Express eru tey nøgd við gongdina í skjótt farna árið., og eru til reiðar at taka tær avbjóðingar, sum framtíðin hevur við sær. Felagið hevur nú 7 ár á baki, og telist í dag millum fremstu fraktspeditørar í landinum..Fyritøkan byrjaði við 3 fólkum, men nú eru 9 fólk í fyritøkuni, og hetta sigur ikki so lítið um vøksturin.

EUR Express hevur støð á Hálsi við flogvøllin. Hetta heldur felagið er ein styrki, tí tey kunnu lofta allari flogfraktini í somu løtu, sum flogførini lenda. Eisini hevur felagið ment seg á sjósíðuni. Í dag flyta tey regluliga bingjur inn úr Danmark við Samskip, sum kemur á Kollafjørð. Felagið hevur fólk á staðnum, sum syrgir fyri, at bingjurnar verða tømdar og fraktin koyrd út til kundarnar.

Vágafólk hava tikið fyritøkuna til sín. Fraktin vestur er vorðin so nógv, at felagið hevur valt at seta ein størri bil inn í skipanina eftir nýttár, men tænastan við smærri bilum verður framhaldandi bæð á morgni og eftir døgurða.

### Atlantic Airways

Føroyska flogfelagið húsast eisini í okkara kommunu. Teirra virksemi avspeglast eisini í inntøkunum hjá kommununum í Vágum. Starvsfólkatalið liggur um 180 ársverk.

Samlaða framleiðslan hjá felagnum var óbroytt fyrstu tríggjar ársfjórðingarnar í 2013 í mun til sama tíðarskeiðið í fjør. Tó er býtið millum rutuflúgving, leiguflúgving við flogførum og tyrluflúgving broytt. Rutuflúgvingin hevði 2% færri flogtímar, meðan tímatalið innan leiguflúgving øktist við 34%. Færri rutuflogferðir, eftir at nýggju Airbus flogførini eru komin, er orsøkin til færri rutuflogtímar. Atlantsflog flýgur leiguflúgving í Europa, til Grønlands og til Egyptalands. Í summar byrjaði felagið at flúgva leiguflúgving úr Danmark til Egyptalands. Orsakað av ófriði í Egyptalandi verður flogið minni til Egyptalands enn upprunaliga ætlað. Eingin tyrluflúgving innan frálandavinnu hevur verið í ár, tí er minni flogið við tyrlum í mun til í fjør.

Rutuflúgving stendur fyri 63 % av framleiðsluni, meðan leiguflúgving stendur fyri 30 % og tyrluflúgving fyri 7 %.

Ferðafólkatalið á rutunetinum er økt 9 % úr 163.032 ferðafólkum upp í 177.957 ferðafólk fyrstu tríggjar ársfjórðingarnar í 2013 í mun til sama tíðarskeiðið í fjør.

FO-380 Sørvágur • Tlf. +298 363200 & 363205 • Fax +298 363201
E-mail: sorvag@sorvag.fo

Fyrstu tríggjar ársfjórðingarnar í 2013 hevði Atlantic Airways 18 mió.kr. í avlopi fyri skatt í mun til 20 mió.kr. í avlopi sama tíðarskeiðið í fjør.

Í 2013 er floti felagsins broyttur munandi. Talið av Airbus A319 flogførum er økt úr 1 upp í 3, meðan talið av Avro RJ flogførum er lækkað úr 3 niður í 1. A319 flogførini taka 144 ferðafólk,

ið er munandi fleiri enn gomlu flogførini. Í mun til gamla flotan rúmast nú 37% fleiri ferðafólk í flogførunum í senn.



**Røktarheimið á Sýnini**



**Sørvágs Kommuna**
FO-380 Sørvágur • Tlf. +298 363200 & 363205 • Fax +298 363201
E-mail: sorvag@sorvag.fo

Eitt gamalt danskt orðatak sigur, "at succes har mange fædre, mens en fiasko er faderløs". Hesi orð renna mær í huga, tá talan er um tað syndarliga hóttafall, sum hevur verið á Sýnini fyri..

Tann stutta søgan um ellisheimið er, at stovnurin er ein sjálvsognarstovnur, sum verður skipaður av einum stýri, har Vága kommuna hevur tveir limir, Sørvágs kommuna tveir limir og sóknarpresturin í Vága prestagjaldi er føddur limur.

Ábyrgdina av at halda heimið við líka hevur Nærverkið undir Almannaráðnum. Vit kunnu leita við ljós og lykt, til bygningurin er niðurdottin av manglandi viðlíkahaldi eftir einum syndabukki, men tað hjálpir bara einki, tíverri..

Við hesum í huga tók bygdaráðið í Sørvági tíðliga í vár ta støðu, at bar tað til at fáa eina skipan á fíggjarliga økinum, sum líkist henni, sum tey nýggju heimini,sum eru bygd eru fíggjað eftir, so var tað ein leistur, sum vit kundu taka undir við. Aðrir møguleikar vóru ikki í eygsjón.

Henda støða okkara hevur loksins borið á mál. Bygdaráðini, Almannaráðið og Fíggjarmálaráðið er samd um ein sáttmála, sum m.a. sigur, at treytað av at løgtingið samtykkir lógaruppskot um studningslán og lán, verður Sýnin umvæld fyri 31,5 mió.kr.

Í sáttmálanum verður sagt, at studningslánið og lánið verður skipað eftir sama leisti, sum til ellis-og røktarheimið í Vági. Hetta merkir, at studningslánið er ein gáva, meðan lánið er eitt rentufrítt lán, sum skal gjaldast aftur eftir fólkatalinum í kommununum. Fer umvælingin at kosta tær 31.5 mió.kr., so er lánið helvtin. Tv.s. at 15.750.000 kr. skulu býtast eftir fólkatalinum, so at Sørvágs kommuna kemur at standa fyri 15.700.000 x 1100/3000 = 5.775.000 kr.,meðan Vága kommuna kemur at standa fyri rest ella 9.975.000 kr
Í sáttmálanum stendur eisini, at í samband við afturgjaldingina eru land og kommuna samd um, at parturin hjá Sørvágs kommunu fellur til gjaldingar fyrst, og síðani parturin hjá Vága kommunu.
Undirritaði nýtti høvi í einari útvarpssamrøðu um Sýnina at takka sitandi bygdaráð fyri at vísa stórsinni í samband við at gjalda fyrst.

Kemur løgtingið til, at Vágsmodellið skal nýtast, so verður afturgjaldstíðin 13 ár. Tað førir við sær, at Sørvágs kommuna skal gjalda í 5 ár, áðrenn Vága kommuna, sum skal gjalda tey næstu 8 árini, byrjar.

Landsverk sigur í sínum tilmæli um Sýnina, at skal røktarheimið virka, meðan umvælt verður, verður neyðugt at fremja umvælingina stig fyri stig. Sostatt verður hetta gjørt yvir eitt áramál svarandi til 3 ár, roknað frá teirri løtu játtan fyriliggur, treytað av, at minkað verður um

**Sørvágs Kommuna**
FO-380 Sørvágur • Tlf. +298 363200 & 363205 • Fax +298 363201

íbúgvaratalið hetta tíðarskeiðið, og at arbeiðið verður skipað í góðum samstarvi við starvsfólkið.

## Bygdaráðsfundir 2014.

Bygdaráðið hevur ásett føstu bygdaráðsfundirnar fyri 2014. Fundirnir verða kl. 18:00 í fundarhølinum á kommunuskrivstovuni niðanfyri nevndu dagar.

Mikukvøldið ................. 29. januar
Mikukvøldið ................. 26. februar
Hóskvøldið ................. 27. mars
Mikukvøldið ................. 30. apríl
Mikukvøldið ................. 28. mai
Mikukvøldið ................. 25. juni
Mikukvøldið ................. 03. september
Mikukvøldið ................. 24. september
Mikukvøldið ................. 29. oktober
Mikukvøldið ................. 12. november
Mikukvøldið ................. 26. november
Mikukvøldið ................. 10. desember

Mál, sum skulu verða viðgjørd á bygdaráðsfundi, skulu vera kommununi í hendi 14 dagar fyri fundin.
Eykafundir ella broytingar í skránni verða lýstir í svørtu talvu á kommunuskrivstovuni og á heimasíðuni hjá Sørvágs kommunu.

## At enda

Nógvir borgarar eru komnir í fólkayvirlitið hjá kommununi í brátt farna ári. Nakrir eru fluttir í kommununa, meðan aðrir eru nýføðingar. Vit fara herfrá at ynskja tykkum hjartaliga vælkomnum.

Nakrir borgarar eru fluttir úr kommununi, og nakrir eru farnar av landinum í lestrarørindum. Øllum tykkum ynskja vit blíðan byr.

Nøkur eru ikki millum okkum meir. Tykkum, ið vara av, ynskja vit, at hann, ið øllum ræður, má styrkja tykkum í ókomnum tíðum.

Og við hesum fari eg vegna bygdaráðið og starvsfólk okkara at ynskja tykkum eitt av Harranum signað nýggjár.

Sørvágur, 18. desember 2013

Sune Jacobsen, borgarstjóri

# Sørvágs kommuna

# Yvirlit

## Høvuðsyvirlit

**Høvuðsyvirlit yvir fíggjarætlan**

| Túsund kr. | Rakstrarætlan Útreiðslur | Rakstrarætlan Inntøkur | 2014 Løgu-ætlan |
|---|---|---|---|
| **§ 1. Kommunal fyrisiting** | **3.155** | - | **150** |
| 11. Felagsútreiðslur | 3.155 | - | 150 |
| **§ 2. Almanna- og heilsumál** | **2.878** | - | - |
| 20. Heilsumál | 1.184 | - | - |
| 21. Almannamál | 1.694 | - | - |
| **§ 3. Børn og ung** | **7.087** | - | **96** |
| 26. Barnaansing | 7.087 | - | 96 |
| **§ 4. Undirvísing** | **3.684** | - | **3.490** |
| 23. Útbúgving og gransking | 3.684 | - | 3.490 |
| **§ 5. Mentan og frítíð** | **2.397** | - | **600** |
| 23. Útbúgving og gransking | 399 | - | - |
| 24. Mentan | 1.998 | - | 600 |
| **§ 6. Teknisk mál** | **4.651** | - | **2.283** |
| 11. Felagsútreiðslur | 1.102 | - | 450 |
| 22. Íbúðarmál | - | - | 90 |
| 24. Mentan | 443 | - | - |
| 30. Umhvørvi | 763 | - | 574 |
| 38. Samferðsla og samskifti | 2.343 | - | 1.170 |
| **§ 7. Kommunal virki** | **2.842** | - | **270** |
| 30. Umhvørvi | 2.047 | - | - |
| 31. Tilbúgving | 371 | - | - |
| 38. Samferðsla og samskifti | 424 | - | 270 |
| **Tilsamans** | **26.694** | - | **6.889** |
| § 20. 22. Íbúðarmál | 900 | - | - |
| § 20. 50. Rentur | 1.053 | 90 | - |
| § 20. 52. Skattir og avgjøld | - | 34.136 | - |
| Tilsamans | 28.647 | 34.226 | 6.889 |
| Yvirskot | - | 5.579 | - |
| **Rakstrar-, løgu- og útlánsætlan RLÚ** | - | **-1.310** | - |
| § 25. 60. Broytingar í "virði" og "skuld v.m." | - | 2.828 | - |
| **Nettokassaúrslit** | - | **1.518** | **1.518** |
| § 25. 62. Afturgjald av skuld | 1.518 | - | - |
| **Bruttokassaúrslit** | **1.518** | **1.518** | **0** |
| Fígging: | | | |

# Høvuðsyvirlit yvir játtanarroknskapin fyri 2012

| Túsund kr. | Játtan Rakstur og útlán Útreiðslur | Inntøkur | Løgur | Roknskapur Rakstur og útlán Útreiðslur | Inntøkur | Løgur |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **§ 1. Kommunal fyrisiting** | **3.159** | **0** | **0** | **3.263** | **0** | **0** |
| 11. Felagsútreiðslur | 3.159 | - | - | 3.263 | - | - |
| **§ 2. Almanna- og heilsumál** | **2.607** | - | - | **2.557** | - | **0** |
| 20. Heilsumál | 1.102 | - | - | 1.018 | - | - |
| 21. Almannamál | 1.505 | - | - | 1.539 | - | - |
| **§ 3. Børn og ung** | **6.595** | - | **250** | **5.880** | - | **222** |
| 26. Barnaansing | 6.595 | - | 250 | 5.880 | - | 222 |
| **§ 4. Undirvísing** | **3.654** | - | **7.924** | **3.638** | - | **8.057** |
| 23. Útbúgving og gransking | 3.654 | - | 7.924 | 3.638 | - | 8.057 |
| **§ 5. Mentan og frítíð** | **2.458** | - | **573** | **2.652** | - | **0** |
| 23. Útbúgving og gransking | 365 | - | - | 469 | - | 0 |
| 24. Mentan | 2.093 | - | 573 | 2.184 | - | - |
| **§ 6. Teknisk mál** | **5.249** | - | **4.629** | **4.587** | - | **4.534** |
| 11. Felagsútreiðslur | 1.021 | - | 1.506 | 877 | - | 1.516 |
| 22. Íbúðarmál | - | - | - | - | - | 58 |
| 24. Mentan | 316 | - | - | 313 | - | - |
| 30. Umhvørvi | 1.201 | - | 743 | 856 | - | 578 |
| 37. Handil og vinna annars | - | - | - | - | - | - |
| 38. Samferðsla og samskifti | 2.711 | - | 2.380 | 2.541 | - | 2.382 |
| **§ 7. Kommunal virki** | **2.768** | - | **908** | **2.709** | - | **934** |
| 30. Umhvørvi | 2.167 | - | - | 2.156 | - | - |
| 31. Tilbúgving | 371 | - | - | 310 | - | - |
| 38. Samferðsla og samskifti | 230 | - | 908 | 244 | - | 934 |
| **Tilsamans** | **26.490** | **0** | **14.284** | **25.286** | **0** | **13.747** |
| § 20. 22. Íbúðarmál | 1.000 | - | - | 860 | - | - |
| § 20. 35. Sjóvinna | - | - | - | - | - | - |
| § 20. 50. Rentur | 1.159 | 280 | - | 907 | 137 | - |
| § 20. 52. Skattir og avgjøld | - | 31.100 | - | - | 35.881 | - |
| Tilsamans | 28.649 | 31.380 | 14.284 | 27.054 | 36.019 | 13.747 |
| Yvirskot | - | 2.731 | - | - | 8.965 | - |

| | Útreiðslur | Inntøkur | Yvirskot | Útreiðslur | Inntøkur | Yvirskot |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrar-, løgu- og útlánsætlan RLÚ** | - | **-11.553** | - | - | **-4.782** | - |
| § 25. 60. Broytingar í "virði" og "skuld v.m." | - | 4.297 | - | - | -468 | - |
| **Nettokassaúrslit** | - | **-7.256** | **-7.256** | - | **-5.250** | **-5.250** |
| § 25. 62. Afturgjald av skuld | 1.144 | - | - | 574 | - | - |
| **Bruttokassaúrslit** | **1.144** | **-7.256** | **-8.400** | **574** | **-5.250** | **-5.824** |
| Fígging: | | | | | | |
| § 25. 64. Útvegan av gjaldføri | 0 | 8.400 | - | 0 | 5.824 | - |
| Fígging íalt: | 0 | 8.400 | 8.400 | 0 | 5.824 | 5.824 |
| **Samanlagt** | **1.144** | **1.144** | - | **574** | **574** | - |